# Tilmæli

## um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa í fiskiárinum 2015-2016

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

# Tilmæli um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa í fiskiárinum 2015-2016

Stovnsmetingarnar, sum Havstovan hevur gjørt, vísa, at upsin er hampiliga væl fyri (Mynd 1-4), meðan toska- og hýsustovnarnir eru sera illa fyri (Mynd 5-14). Tilgongdin hjá toski og hýsu hevur svikið í fleiri ár á rað enn nakrantíð áður í nýggjari tíð, og eingi útlit eru til bata komandi árið. Toskur og hýsa eru undir ella ájavnt við minstamarkið, og vit eru í longsta tíðarskeiði við fiskaloysi, ið hagtøl eru tøk fyri (síðani fyrst í 1900-talinum fyri Landgrunnin og 1965 fyri Føroyabanka). Neyðugt er at taka støðuna í stovnunum og náttúruviðurskiftini til eftirtektar og seta álvarslig tiltøk í verk, í eini roynd at fáa stovnarnar upp aftur á føtur.

Tilmælið frá Havstovuni fyri tosk, hýsu og upsa miðar ímóti at hava eitt veiðutrýst (prosentpart, sum verður veiddur úr stovninum um árið), sum gevur størstu langtíðarveiðu. Tá stovnarnir eru væl fyri, er hetta veiðutrýstið fyri upsa, hýsu og tosk ávikavist 24%, 20% og 25%. Tá stovnarnir eru illa fyri, er tó neyðugt at hava lægri veiðutrýst tað tíðarskeiðið, meðan stovnarnir koma fyri seg aftur.

Í løtuni er upsi hampiliga væl fyri, og mælt verður til at fylgja langtíðarmálinum fyri burðardygt veiðutrýst. Men toskur og hýsa eru illa fyri og mælt verður til at hava eitt munandi lægri veiðutrýst, til stovnarnir eru komnir fyri seg aftur.

Roknað verður við, at ein niðurskurður í døgum gevur sama niðurskurð í veiðutrýsti.

Í hesum tilmæli er víst á átøk, ið Havstovan mælir til at fáa framd. Eisini eru viðmerkingar til tey einstøku átøkini og at enda generellar grundgevingar.

**Átøk**

Við støði í §22 Stk. 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap, mælir Havstovan til hesi átøk í umsiting av fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum í fiskiárinum 2015/2016:

**a) Mælt verður til at taka allar óbrúktar dagar í fiskiárinum 2013/2014 úr skipanini.**

***Viðmerking:*** *Óbrúktu fiskidagarnir í fiskiárinum 2013/2014 verða nýttir sum grundarlag, tí hetta er seinasta fiskiár, har endalig tøl eru tøk.*

*Fyri allar veiðubólkarnar samanlagt er einans umleið helvtin av teimum tillutaðu døgunum brúkt hesi seinastu 3 fiskiárini (Talva 1 og 2). Størsta avlopið er í bólkunum 3, 4 og 5. Hetta eru skip, ið serliga veiða tosk og hýsu.*

*Ein vansi við at hava nógvar óbrúktar dagar í skipanini er, at um tilgongdin til stovnarnar batnar aftur, so vísa royndirnar okkum, at hesir óbrúktu dagarnir gerast virknir aftur og forða stovnunum í at koma fyri seg aftur. Harumframt geva teir brúktu dagarnir hóskandi langtíðar veiðutrýst, so pláss er ikki fyri, at teir óbrúktu dagarnir eisini eru við.*

**b) Fyri bólk 2 (trolarar), ið serliga fiskar upsa, eigur tað tillutaða dagatalið at vera ájavnt teir brúktu dagarnar í fiskiárinum 2013/2014.**

**Fyri at verja tann smáa upsan, verður harumframt mælt til at rist verður brúkt í upsatrolum undir Føroyum.**

***Viðmerking:*** *Bólkur 2 fiskar mest upsa, og veiðutrýstið hevur í mong ár verið í hægra lagi (Mynd 1-4). Í farna ári kom veiðutrýstið tó niður ímóti langtíðarmálinum. Við tað at støddin á upsastovninum er yvir tað átakskrevjandi markið $B_{trigger}$, verður mælt til sama dagatal, sum teir brúktu dagarnir í fiskiárinum 2013/14. Hetta merkir ein niðurskurð í tillutaðum døgum upp á umleið 11%. Tilgongdin tykist vera góð og væntandi fer upsastovnurin at vaksa nakað.*

*Kanningar hava víst, at rist ið hevur 55 mm frástøðu millum rimarnar, skilir væl undirmálsfisk frá, uttan at skipið missir tann størra fiskin (Skjal 4). Mælt verður myndugleikunum til at fáa viðgerð í lag um, hvussu átakið við rist í upsatroli kann setast í verk.*

**c) Fyri bólkarnar, ið serliga veiða tosk og hýsu, sum eru bólkur 3, 4 og 5 (línuskip, smáir trolarar og útróðrarbátar), verður mælt til, at teir tillutaðu fiskidagarnir komandi fiskiár verða 50% av teimum brúktu døgunum í fiskiárinum 2013/2014. Hetta er fyri at fáa stovnarnar upp aftur á eitt lívfrøðiliga trygt støði.**

***Viðmerking:*** *Lagt verður upp til, at so hvørt sum stovnarnir vaksa, kunnu samsvarandi fleiri dagar av hesum 50% niðurskurðinum av brúktu døgunum, loyvast aftur í skipanina.*

*Átakið við sera fáum fiskidøgum er neyðugt, av tí at tilgongdin av nýggjum árgangum til stovnarnar áhaldandi er lítil.*

*Lívfrøðiliga hevði verið best at bannað allari veiðu eftir hýsu, men tað hevði elvt til, at næstan allur flotin varð lagdur.*

*Hýsustovnurin (Mynd 5-8) hevur ongantíð verið minni enn hesi seinastu árini, er væl undir bæði átakskrevjandi markinum $B_{trigger}$ og er enntá undir minstamarkinum $B_{lim}$. Framskrivingar vísa, at har fer stovnurin at halda seg næstu 2 árini. Bert við ongum fiskiskapi kvinkar hann seg beint upp um minstamarkið $B_{lim}$.*

*Eisini toskur er illa fyri (Mynd 9-12), og hevur ligið um minstamarkið $B_{lim}$ síðan 2005. Tilgongdin er lítil og framskrivingarnar benda á, at stovnurin fer í hvussu so er at halda seg undir átakskrevjandi markinum $B_{trigger}$ komandi 2 árini.*

*Tilráðingin tekur støði í MSY-regluni (Maximum Sustainable Yield), sum sigur, at tá stovnarnir eru heilt smáir, eigur eitt serliga lágt veiðutrýst at vera, meðan stovnarnir byggja seg upp. Av tí, at hýsustovnurin er so sera illa fyri og toska- og hýsufiskiskapur er blandaður fiskiskapur, mælir ICES til, at eingin beinleiðis fiskiskapur verður eftir hýsu og at veiðutrýstið á toskin er so lágt sum til ber. Lívfrøðiliga er hetta tað rætta at gera, men samfelagsliga er tað sera torført. Tilmælið hjá ICES tekur eisini støði í, at eingin umsitingarætlan er sett í gildi fyri Føroyar. Um ein umsitingarætlan, í tráð við MSY-regluna og møgulig vinnulig atlit, hevði verið sett í gildi, hevði ráðgevingin hjá ICES helst verið í mun til umsitingarætlanina.*

*Havstovan mælir til niðurskurð í fiskidøgunum og samstundis at verja smáan tosk og smáa hýsu í økjum, ið plaga at hava serliga nógv av hesum (Mynd 16 og 18). Samstundis tálma tey stongdu økini veiðutýstið.*

*Tað er vanliga eitt tætt samband millum gróðurin í sjónum og tilgongd og vøkstur hjá toski og hýsu. Men tey seinastu árini hevur tilgongdin verið minni enn væntast kundi út frá gróðrinum, meðan vøksturin hjá fiskinum hevur samsvarað betur. Gróðurin í 2014 var beint yvir miðal (Mynd 15). Várgróðurin í 2015 hevur púra svikið, og fyribils sær út til, at gróðurin í ár verður sera lítil.*

**d) Fyri at verja teir yngstu árgangirnar av hýsu, mælir Havstovan til at friða eina leið eystanfyri alt árið (Mynd 16).**

**e) Fyri at verja teir yngstu árgangirnar av toski, mælir Havstovan til at halda fram við at friða ungfiskaleiðirnar á mynd 17.**

***Viðmerking:*** *Tað er sera umráðandi, fyri at fáa toska- og hýsustovnin at vaksa aftur, at tann smái fiskurin fær so nógvan frið sum gjørligt, so at hann kann seta til tann vaksna stovnin. Havstovan mælir til fyribils at halda fram við tveimum økisfriðingum, ið vóru í gildi frá juli 2011 til august 2013 (Mynd 17), tí hetta eru ungfiskaleiðir burturav (Mynd 18), umframt eitt øki eystanfyri, har nógv hýsa plagar at vera (Mynd 16).*

*Úrslit frá „Marine Protected Areas“ aðrar staðir í heimi vísa týðiliga, at nøgdin av fiski í slíkum økjum er nógv størri enn uttanfyri, og at slík økir kunnu halda fiskastovnum uppi. Ofta er fiskiskapurin góður beint uttan fyri slík økir, og hetta var eisini støðan í friðaða økinum norður-vestur úr Mykinesi í 2012.*

**f) Mælt verður til, at gýtingarfriðingarnar av toski verða einans á trimum leiðum (Mynd 19), har mest er av gýtandi fiski og at hesir tríggir kassarnir verða stongdir fyri allari veiðu í tíðarskeiðinum 15. februar-15. apríl. Uttari partur av kassanum vestan fyri Sandoynna (t.e. uttan fyri 12 fj. úr grundlinjuni) eigur at verða friðaður fyri trolveiðu í sama tíðarskeiði, fyri at verja gýtandi upsa, meðan húkaveiða eigur at verða loyvd.**

***Viðmerking:*** *Gýtingarfriðingarnar eru endurskoðaðar av einum arbeiðsbólki umboðandi fiskivinnuna, Fiskimálaráðið, VØRN og Havstovuna. Mælt verður her til somu broyting, sum bólkurin hevur skotið upp (Skjal 5).*

*Um átakið í punkt e) um friðaðar ungfiskaleiðir verður sett í verk, mugu gýtingarfriðaðu økini tillagast hesum.*

**g) Fyri at fáa neyvari upplýsingar um fiskileiðir og veiðuhagtøl hjá útróðrarbátum á teimum innastu leiðunum, verður mælt til, at**

1. **Øll fiskifør fáa sær AIS skipan.**
2. **Fráboðast skal, tá túrur byrjar og endar.**
3. **Upplýsast skal um alla veiðuna, eisini undirmálsfiskin.**

***Viðmerking:*** *Tørvur er á at fáa til vega meira álítandi hagtalstilfar um útbreiðslu av fiski (íroknað smáfisk) á innaru leiðum. Tí verður mælt til, at AIS-skipan (Automatic Identification System) verður kravd í útróðrarbátar, eins og øll onnur fiskifør undir Føroyum. Eisini eigur fráboðan um fiskiskap at gerast betur. Tilmælið er í samsvari við tað, sum arbeiðsbólkurin hevur skotið upp (Skjal 5).*

**h) Fyri at lætta um trýstið á tær innaru leiðirnar, verður mælt til, at myndugleikarnir seta tiltøk í verk soleiðis at húkaveiðan kemur at troyta tær ytru leiðirnar meira.**

***Viðmerking:*** *Tann vánaliga støðan á grunnum leiðum við Føroyar tykist ikki vera galdandi fyri tær djúpu leiðirnar. At fáa húkaroyndina longur út hevði lætt um trýstið á innaru leiðirnar, og myndugleikarnir eiga tí at seta tiltøk í verk, soleiðis at hetta verður gjørligt.*

**i) Eingin vinnuligur fiskiskapur eigur at vera loyvdur á Føroyabanka, grynri enn 200 m.**

***Viðmerking:*** *Toskastovnurin á Føroyabanka er á sama lága støði sum seinast í 1980-árunum og fyrst í 1990-árunum (Mynd 13-14). Tá varð Bankin friðaður, og tað tók bert fá ár hjá stovninum at koma fyri seg aftur. Í friðingini, sum nú er, tekur uppbyggingin av stovninum longri tíð. Seinasta kanningin á vári 2015 hjá Havstovuni vísti, at stovnurin enn er sera lítil.*

*Mælt verður til, at Bankin er friðaður fyri alla vinnuliga veiðu, inntil yvirlitstrolingarnar hjá Havstovuni vísa, at toskastovnurin er komin upp á miðalstøddina fyri tíðarskeiðið 1996-2002.*

**j) Mælt verður til at seta í verk eina umsitingarætlan fyri tosk, hýsu og upsa (skjal 3), ið byggir á lívfrøðilig tilvísingarvirði, og ið greitt sigur, hvat skal gerast, um stovnarnir minka niður um minstamarkið.**

***Viðmerking:*** *Havstovan mælir aftur hesaferð til, at tað verður gjørd ein umsitingarætlan fyri okkara høvuðsbotnfiskasløg, ið lýkur altjóða krøv fyri burðardygga veiðu. Mælt verður til, at veiðusetningurin skal byggja á ta MSY-regluna, sum tryggjar, at stovnarnir verða veiddir burðardygt, og at tað í longdini kann veiðast sum mest burtur úr stovnunum.*

*Havstovan hevur saman við umboðum fyri vinnuna og Fiskimálaráðið verið við til at gera eitt upplegg til slíka umsitingarætlan (Skjal 3). Ætlanin er latin Fiskimálaráðnum í oktober 2011, men enn er hon hvørki viðgjørd ella sett í verk.*

**Grundgevingar**

Í §2 í lógini um vinnuligan fiskiskap verður millum annað sagt: „Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga“.

Ráðgevingin tekur støði í lógini og í stovnsmetingunum hjá Havstovuni/ICES í 2015 (Skjal 1) og í ráðgevingini hjá ICES í 2015 (Skjal 2). Mint skal verða á, at av tí at eingin góðkend umsitingarætlan er, so mælir ICES til á ein slíkan hátt, at stovnurin skal kunna vera komin fyri seg aftur eftir einum ári, í hesum føri í 2017. Um ein umsitingarætlan hevði verið sett í verk, hevði ráðgevingin frá ICES havt ein langtíðardám og hevði eisini givið vinnuni meira støðugar karmar.

Tað er avgerandi at halda gýtingarstovnarnar oman fyri eina minstustødd, og at veiðutrýstið verður stillað so, at veiðan er burðardygg og samstundis, at sum mest fæst burtur úr stovnunum. Hetta er grundarsteinur í okkara ráðgeving. Um gýtingarstovnar minka niður um ásetta minstamarkið, eigur ein ætlan at vera til taks, sum sigur, hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk fyri at fáa gýtingarstovnarnar at koma fyri seg aftur. Uppskot til eina umsitingarætlan varð gjørt í 2011 (Skjal 3), men enn er hon ikki sett í verk.

Hesi seinastu árini hava teir brúktu fiskidagarnir givið eitt veiðutrýst á toska- og hýsustovnin, ið er tætt við langtíðarmálið ($F_{MSY}$), sum er at fiska ávikavist 25% og 20% í tali úr stovninum. Sostatt eru teir óbrúktu dagarnir ov nógvir í skipanini og tá/um teir verða virknir aftur, fer veiðutrýstið langt upp um langtíðarmálið.

Tá tað í hesum tilmæli eisini verður mælt til niðurskurð í teimum brúktu døgunum fyri veiðubólkar, ið serliga veiða tosk og hýsu, er orsøkin, at stovnarnir eru sera smáir, umframt at eingi útlit eru til batnandi tilgongd. So hvørt sum stovnarnir koma fyri seg aftur, kann veiðutrýstið hækka so líðandi upp á langtíðarmálið ($F_{MSY}$).

**Upsi undir Føroyum:** Upsin, ið hesi seinastu nógvu árini hevur verið okkara høvuðsbotnfiskaslag, er hampiliga væl fyri (Mynd 1-4), tí stovnurin er yvir átakskrevjandi markinum ($B_{trigger}$). Orsøkin er, at tilgongdin áhaldandi hevur verið góð. Vegna ein góðan árgang (2011-árgangin), sum nú er á veg inn í gýtingarstovnin, er stovnurin í vøkstri og væntast at halda seg yvir átakskrevjandi markinum komandi árið. Tí verður í hesum tilmæli ráðgivið við langtíðar veiðutrýstinum fyri upsa (24% í tali av stovninum). Veiðutrýstið hevur hesi seinastu árini verið í hægra lagi, men kom í fjør niður ímóti langtíðarmálinum.

**Hýsa undir Føroyum:** Gýtingarstovnurin er heilt illa fyri (Mynd 5-8). Stovnurin er minkaður sera nógv síðan 2003 og er mettur at vera umleið 16.500 tons í 2014. Síðani 2010 er hann mettur at vera undir minstamarkinum (22.000 tons) fyri, hvat verður mett at vera ráðiligt. Miðal veiðutrýstið seinastu 3 árini er beint oman fyri langtíðar veiðutrýstið ($F_{MSY}$), ið er galdandi, um stovnurin er væl fyri. Eins og fyri tosk, hevur tilgongdin verið væl undir miðal líka síðani 2005. Stovnurin er í spakuligum vøkstri, men fer mest sannlíkt at halda seg undir minstamarkinum komandi árið. ICES endurtekur ráðgevingina frá í fjør og sigur, at eingin beinleiðis fiskiskapur eigur at vera, og at hjáveiðan av hýsu í fiskiskapinum eftir øðrum fiski eigur at vera so lítil sum gjørligt. Neyðugt er við eini endurreisingarætlan (Recovery plan) fyri, hvussu stovnurin kann koma fyri seg aftur.

# UPSI




*Mynd 1. Heildarveiða av upsa frá 1961 til 2014. Miðalvirðið er 37,0 túsund tons.*




*Mynd 2. Tilgongd av 3 ára gomlum upsa frá 1961 til 2014, frá stovnsmetingini í 2015. Miðalvirðið er 31,7 milliónir.*




*Mynd 3. Gýtingarstovnurin av upsa frá 1961 til 2014, frá stovnsmetingini í 2015. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 55 túsund tons. $B_{lim}$ er ikki definerað fyri upsa.*




*Mynd 4. Veiðutrýst fyri upsa frá 1961 til 2014, frá stovnsmetingini í 2015. $F_{pa}$ og $F_{MSY}$ eru 0,3. $F_{lim}$ er ikki definerað fyri upsa.*

# HÝSA




*Mynd 5. Heildarveiða av hýsu frá 1957 til 2014. Miðalvirðið er 15,5 túsund tons.*




*Mynd 6. Tilgongd av 2 ára gamlari hýsu frá 1957 til 2014, frá stovnsmetingini í 2015. Miðalvirðið er 26,2 milliónir.*




*Mynd 7. Gýtingarstovnur av hýsu frá 1957 til 2014, frá stovnsmetingini í 2015. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 35 túsund tons. $B_{lim}$ er 22 túsund tons.*




*Mynd 8. Veiðutrýst fyri hýsu frá 1957 til 2014, frá stovnsmetingini í 2015. $F_{lim}$ er 0,4, $F_{pa}$ og $F_{MSY}$ eru 0,25.*

# TOSKUR á Landgrunninum




*Mynd 9. Heildarveiða av toski á Landgrunninum frá 1959 til 2014. Miðalvirðið er 21,8 túsund tons.*




*Mynd 10. Tilgongd av 2 ára gomlum toski á Landgrunninum frá 1959 til 2014, frá stovnsmetingini í 2015. Miðalvirðið er 14,7 milliónir.*




*Mynd 11. Gýtingarstovnur av toski á Landgrunninum frá 1959 til 2014, frá stovnsmetingini í 2015. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 40 túsund tons. $B_{lim}$ er 21 túsund tons.*




*Mynd 12. Veiðutrýst fyri tosk á Landgrunninum frá 1959 til 2014, frá stovnsmetingini í 2015. $F_{lim}$ er 0,68, $F_{pa}$ er 0,35 og $F_{MSY}$ er 0,32.*

# TOSKUR á Føroyabanka




*Mynd 13. Heildarveiða av toski á Føroyabanka frá 1965 til 2014. Frá 2008 hevur Føroyabanki stórt sæð verið friðaður fyri fiskiskapi. Miðalvirðið er 1,76 túsund tons.*




*Mynd 14. Veiða upp á roynd av toski frá yvirlitstrolingum hjá Magnusi Heinasyni á Føroyabanka á ávikavist vári og á sumri. Veiða upp á roynd er eitt lutfalsligt mát fyri, hvussu stórur stovnurin er. Óvissan í kg pr. tíma er víst sum gráar loddrættar strikur. Miðalvirðið um várið er 575,4 kg/tíma árini 1996 til 2002. Miðalvirðið um summarið er 289,4 kg/tíma árini 1996 til 2002.*




*Mynd 15. Gróður undir Føroyum árini 1990 til 2014. Miðalvirðið er 8,7.*

*Talva 1. Tal á tillutaðum døgum sambært løgtingslógir.*

| | | Bólkur | | | | | | | Tøkir | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskiár | Løgtingslóg | 2 ytri | 2 innari | 3 | 4 A | 4 B | 4 T | 5 | (at ráða yvir) | Dagar íalt |
| 1996/1997 [a,b] | 84 6/6-97 | | 8225 | 3040 | 5600 | 3410 | | 27000 | 660 | 49585 |
| 1997/1998 | 133 9/8-97 | | 7199 | 2660 | 4696 | 4632 | | 23625 | 577 | 43389 |
| 1998/1999 | 69 18/8-98 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | 548 | 41219 |
| 1999/2000 | 80 17/8-99 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | 548 | 41219 |
| 2000/2001 | 104 17/8-00 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | 548 | 41219 |
| 2001/2002 | 115 15/8-01 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | | 40671 |
| 2002/2003 | 76 13/8-02 | | 6771 | 2502 | 4416 | 4356 | | 22220 | | 40265 |
| 2003/2004 | 100 8/8-03 | | 6636 | 2452 | 4328 | 4269 | | 21776 | | 39461 |
| 2004/2005 | 49 18/8-04 | | 6536 | 2415 | 4263 | 4205 | | 21449 | | 38868 |
| 2005/2006 | 98 19/8-05 | | 5752 | 3578 | 1770 | 2067 | 1766 | 21235 | | 36168 |
| 2006/2007 | 81 17/8-06 | | 5752 | 3471 | 1717 | 2005 | 1713 | 20598 | | 35256 |
| 2007/2008 | 80 20/8-07 | | 5637 | 3402 | 1683 | 1965 | 1679 | 20186 | | 34552 |
| 2008/2009 [c] | 62 25/5-09 | | 4638 | 3095 | 1393 | 1848 | 1621 | 18167 | | 30762 |
| 2009/2010 | 106 17/8-09 | | 4406 | 2940 | 1323 | 1756 | 1540 | 17259 | | 29224 |
| 2010/2011 [d] | 87 18/8-10 | | 4274 | 2852 | 1323 | 1756 | 1540 | 13259 | | 27604 |
| 2011/2012 | 105 18/8-11 | 1530 | 4657 | 2567 [e] | 1058 | 1405 | 1386 | 10607 | | 23210 |
| 2012/2013 | 89 17/8-12 | 1530 | 4626 | 2567 | 1011 | 1533 | 1386 | 10607 | | 23260 |
| 2013/2014 | 109 16/8-13 | 1530 | 4441 | 2387 | 1011 | 1533 | 1386 | 9865 | | 22153 |
| 2014/2015 | 89 18/8-14 | 1530 | 4445 | 2387 | 1029 | 1530 | 1386 | 9865 | | 22172 |

[a] *1996/1997, 12/15 mdr, sambært løgtingslóg 50 20/5 1996, eru dagarnir í bólki 4 A- 3080, 4 B- 3080, 4 D- 1540, 5- 22000, tøkir- 1000 og tilsamans 43585 dagar*
[b] *1996/1997 , vóru 1650 dagar í bólki 4 D*
[c] *2008/2009, sambært løgtingslóg 76 15/8-08, eru dagarnir í bólki 2 innari 5073 dagar, 3- 3062, 4 A- 1515, 4 B- 1769, 4 T- 1511, 5- 18167 og íalt 31097 dagar*
[d] *2010/2011, vóru 2600 dagar í bólki 1 ytra + 1 innara*
[e] *2011/2012, sambært løgtingslóg 112 2/9-11, vóru dagar í bólki 3 broyttir frá 2667 til 2567*

*Talva 2. Samanbering av tillutaðum og nýttum døgum síðan 2009/2010.*

| | | Bólkur | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskiár | | 2 ytri | 2 innari | 3 | 4 A | 4 B | 4 T | 5A | 5B | Íalt | Óbrúkt |
| 2009/2010 | Tillutaðir dagar | | 4406 | 2940 | 1323 | 1756 | 1540 | 6904 | 10355 | 29224 | |
| | Brúktir dagar | | 4585 | 2078 | 426 | 1158 | 1382 | 3534 | 6215 | 19378 | |
| | % brúktir dagar | | 104% | 71% | 32% | 66% | 90% | 51% | 60% | 66% | 34% |
| 2010/2011 [d] | Tillutaðir dagar | | 4274 | 2852 | 1323 | 1756 | 1540 | 5304 | 7955 | 27604 | |
| | Brúktir dagar | | 3883 | 2071 | 405 | 1016 | 1412 | 2856 | 4525 | 17506 | |
| | % brúktir dagar | | 91% | 73% | 31% | 58% | 92% | 54% | 57% | 63% | 37% |
| 2011/2012 | Tillutaðir dagar | 1530 | 4657 | 2567 [e] | 1058 | 1405 | 1386 | 5060 | 5547 | 23210 | |
| | Brúktir dagar | 895 | 4758 | 1986 | 260 | 657 | 1313 | 1834 | 3160 | 14862 | |
| | % brúktir dagar | 58% | 102% | 77% | 25% | 47% | 95% | 36% | 57% | 64% | 36% |
| 2012/2013 | Tillutaðir dagar | 1530 | 4626 | 2567 | 1011 | 1533 | 1386 | 4730 | 5877 | 23260 | |
| | Brúktir dagar | 879 | 3953 | 1205 | 271 | 688 | 1166 | 1410 | 2845 | 12415 | |
| | % brúktir dagar | 57% | 85% | 47% | 27% | 45% | 84% | 30% | 48% | 53% | 47% |
| 2013/2014 | Tillutaðir dagar | 1530 | 4441 | 2387 | 1011 | 1533 | 1386 | 4311 | 5554 | 22153 | |
| | Brúktir dagar | 797 | 3916 | 1120 | 272 | 519 | 895 | 1136 | 3337 | 11992 | |
| | % brúktir dagar | 52% | 88% | 47% | 27% | 34% | 65% | 26% | 60% | 54% | 46% |
| 2014/2015 | Tillutaðir dagar | 1530 | 4455 | 2387 | 1029 | 1530 | 1386 | 2640 | 7225 | 22182 | |
| (Pr. 1. juni) | Brúktir dagar | 855 | 3132 | 1024 | 179 | 437 | 458 | 942 | 2177 | 9203 | |
| | % brúktir dagar | 56% | 70% | 43% | 17% | 29% | 33% | 36% | 30% | 41% | 59% |
| *2014/2015 ** | *Framskrivaðir dagar* | *1140* | *4176* | *1365* | *238* | *582* | *611* | *1256* | *2903* | *12271* | |
| | *Framskrivað %* | *75%* | *90%* | *53%* | *24%* | *38%* | *44%* | *27%* | *49%* | *53%* | *47%* |

** Mett ársnýtsla fyri fiskiárið 2014/2015 (faktor 1,3333)*




*Mynd 16. Miðaltal av hýsu minni enn 40 cm fyri árini 1996-2014 á yvirlitstrolingum hjá Magnusi Heinasyni. Reytt er høgt tal av ungfiski, myrkablátt er ongin ungfiskur. Mælt verður til at friða økið við nógvum ungfiski (reytt øki).*




*Mynd 18. Miðaltal av toski minni enn 50 cm fyri árini 1996-2014 á yvirlitstrolingum hjá Magnusi Heinasyni. Reytt er høgt tal av ungfiski, myrkablátt er ongin ungfiskur.*




*Mynd 17. Ungfiskaleiðir, sum áður hava verið stongdar.*




*Mynd 19. Uppskot til endurskoðan av gýtingarfriðaðum økjum. Tey bláu økini eru nýggj og onnur øki eru tikin burtur. Hesi øki eiga at friðast fyri allan reiðskap í tíðarskeiðinum 15. februar til 15. apríl. Í myrkagráa økinum kann húkaveiða tó verða loyvd.*

**Toskur á Landgrunninum:** Gýtingarstovnurin hevur verið sera lítil síðani 2004 (Mynd 9-12). Stovnurin er í 2014 mettur at vera 21.140 tons. Hetta er beint við minstamarkið, ið av ICES er sett at vera 21.000 tons. Langtíðarmálið er, at stovnurin skal í minsta lagi vera 40.000 tons, og til samanberingar kann nevnast, at fyri árini 1959-2005 var gýtingarstovnurin í miðal 62.300 tons.

Høvuðsorsøkin til, at stovnurin er so lítil, er, at tilgongdin hevur svikið í nógv ár á rað. Tilgongdin av 2 ára gomlum toski hevur líka síðani 2001 verið undir miðal, og í 2011-2014 er hon mett at vera sera lítil.

Veiðutrýstið minkaði nógv í 2010-2013 og hækkaði eitt sindur aftur í 2014, soleiðis at tað var væl oman fyri $F_{MSY}$ (ið hevði verið galdandi, um stovnurin var væl fyri). Av tí at gýtingarstovnurin er so sera lítil, og av tí at eingin beinleiðis fiskiskapur eigur at vera eftir hýsu, mælir ICES til at toskaveiðan skal vera minst møgulig. Eisini mælir ICES til, at ein ætlan um blandaðan fiskiskap – hvussu nakað kann fiskast av toski, samstundis sum sum minst av hýsu er uppií – eigur at gerast (Mixed-fishery management plan).

**Toskur á Føroyabanka:** Stovnurin hevur verið sera illa fyri í nógv ár (Mynd 13-14). Tilgongdin hevur verið sera lítil í mong ár og ráðgevingin fyri komandi fiskiár er tann sama, sum hevur verið givin síðani 2008: Eingin toskafiskiskapur eigur at verða loyvdur á Føroyabanka, fyrr enn yvirlitstrolingarnar hjá Havstovuni vísa, at toskastovnurin er komin upp á miðalstøddina fyri tíðarskeiðið 1996-2002.

Tá fiskastovnarnir eru væl fyri, er vanliga einki beinleiðis samband millum støðd á gýtingarstovninum og tilgongd. Øðrvísi er, tá stovnarnir eru óvanliga smáir. Tá er tilgongdin sum oftast lítil, serliga tá livilíkindini hjá avkominum eru vánalig. Hetta sæst skilliga fyri tosk á Landgrunninum og hýsu undir Føroyum. Fiskur, ið livir í skiftandi umhvørvi, hevur ymiskar hættir at økja um sannlíkindini fyri, at nakað kemur undan, men tess færri gýtandi fiskar eru, tess torførari er hjá stovninum at taka hædd fyri skiftandi livilíkindum hjá avkominum. Umráðandi er tí at gera alt, sum gerast kann, fyri at gýtingarstovnurin kann vaksa. Eisini verður mælt til at gera tað, ið gerast kann,

fyri at tað avkomið, ið kemur undan, fær umstøður at seta til gýtingarstovnin.

Vánalig viðurskifti í umhvørvinum eru ikki orsøk til ikki at seta neyðug tiltøk í verk. Tvørturímóti eiga myndugleikarnir at seta tiltøk í verk, hóast stovnarnir ikki koma fyri seg líka skjótt, sum undir góðum náttúruviðurskiftum. Vit noyðast at taka náttúrutreytirnar til eftirtektar og laga okkum eftir teimum. Ein góð umsiting av fiskastovnunum *miðar ímóti*, at stovnarnir ikki fara niður um minstumørkini, hóast náttúruviðurskiftini eru vánalig. Vit kunnu staðfesta, at toskur og hýsa hava verið ájavnt við, ella undir, minstumørkini á ávikavist 21.000 og 22.000 tons í umleið helvtina av tíðini, sum fiskidagaskipanin hevur verið í gildi.

Havstovan, 15-06-2015

Eilif Gaard, stjóri

**Tilfar**

Hetta tilmælið er grundað á:

**Skjal 1. Report of the North-Western Working Group (NWWG) 2015. ICES C.M. 2015/ACOM:07.** Grundarlagið fyri ráðgevingini hjá bæði ICES og Havstovuni, m.a. ein lýsing av umhvørvi og fiskiskapi, hagtøl fyri veiðu og roynd, tilfar frá vísindaligum kanningum og stovnsmetingin av einstøku stovnunum (á enskum) (sí www.ices.dk).

**Skjal 2. The Faroe Plateau Ecosystem. ICES 2015.** Ráðgevingin hjá ICES (á enskum) (sí www.ices.dk).

**Skjal 3. Umsitingarætlan fyri toska-, hýsu- og upsastovnarnar í føroyskum sjógvi.** Upprit latið Fiskimálaráðnum í oktober 2011.

**Skjal 4. Ávirkan av skiljirist og friðing á upsaveiðu hjá partrolarum.** Havstovan nr. 14-07. Smárit. http://www.hav.fo/PDF/Ritgerdir/2014/Smarit1407.pdf

**Skjal 5. Meting av friðaðum og stongdum økjum.** Frágreiðing til Fiskimálaráðið. http://www.hav.fo/PDF/Ritgerdir/2014/Meting_fridadum_stongdum_okjum.pdf

## Skipabólkar

**Fiskiflotin er býttur upp í hesar høvuðsbólkar, sum allir hava serlig rættindi.**

| | |
|---|---|
| Bólkur 2: | Trolarar |
| Bólkur 3: | Línuskip yvir 110 tons |
| Bólkur 4: | Útróðrarbátar yvir 15 tons |
| Bólkur 5: | Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu<br>*Bólkur 5 er býttur í 5 A og 5 B, alt eftir um bátarnir eru fullriknir ella ei.* |
| Bólkur 6: | Onnur veiða |

**Bólkur 4 er býttur upp í tríggjar undirbólkar, tá tað kemur til at tilluta fiskidagar:**

| | |
|---|---|
| 4 A: | Útróðrarbátar millum 15-40 tons |
| 4 B: | Útróðrarbátar størri enn 40 tons á línuveiðu |
| 4 T: | Útróðrarbátar størri enn 40 tons á trolveiðu |

*Kelda: Lóg um vinnuligan fiskiskap (broytt 17. aug. 2012)*